VIÐMERKINGAR

Útvarpsgjald og hvat so???

Ein viðmerking frá einum útvarpsgjaldara

Petur Jacobsen
í Søldafirði: 13. oktober 2004



Var tað nú rætt at siga sjónvarpsstjóranum Mikkjal Helmsdal upp?

Er Jógvan Jespersen tann rætti til at leiga samanlagda stovnin?

Ein av grundgevingunum fyri at Jógvan Jespersen er best egnaður til starvið er - sambart landstýrismanninum Jógvan á Lakjuni - at hann hevur megna at reka ÚF sum ein fíggjarliga sterkan stovn ímóti Mikkjal Helmstal sum ikki megnaði í sama mun at fáa nakað serligt burtur úr SVF.

Men samanlíkna vit nú konkret hvat ÚF gevur lurtaranum fyri 30 milliónir er myndin ikki so langt frá hvat SVF megnaði at fáa burturúr fyri sínar 30 milliónir.

Skráin hjá ÚF er 105 tímar (100%) um vikuna harav eru umleið 57 tímar tónleikur ella presentatión av tónleiki (54%), av teimum írestandi 43 tímunum (46%), eru 24 tímar endursendingar (22.5 %) 8 tímar eru tíðindi (7,5%) , nú eru bert 16 tímar eftir sum kann kallast egin framleiðsla tað vil siga (16%). og vit vita at stórur partur av hesum kemur frá freelansarum, mest úr Klaksvík.

Taka vit tíðindafólkini, sum framleiða umleið 8 tímar um vikuna frá, eru eini 30 fulltíðarstørv eftir til at framleiða 16 tímar.

Heðin Arge situr á einum stórum parti av sendingunum um kvøldi einar 9 tímar har hann spælir fyri ein stóran part umaftur tað sum var í morgun-sendingini hjá Bjarna Mohr og Øssur Egholm, helst er hann teknikari sjálvur so har ger hann arbeiði fyri tvey, eftir er so Elis Poulsen sum leggur løg á, sum fólk hava ynskt, í umleið 5 tímar um vikuna, Jákup Magnussen hevur 1 tíma um dagin í 5 dagar,Armgarð Arge við "Tilvera" í 30 minuttir um vikuna, Ovi Olsen spælir klassiskt, 1 tíma um vikuna. Fleiri onnur nøvn, serliga Mohr, Egholm og Arge ganga aftur við stytri pettum í skránni hjá ÚF.

Eg havi við skránni hjá ÚF, í tíðarskeiðnum frá mánadegnum 27.sept. til sunnudagin 03. okt. 2004 sum grundarlag, skriva hesa grein og loyvt mær at samanlíkna við tað sum Mikkjal Helmstal segði at SVF kundi bjóða fyri umleið somu pengar, havandi í huga at tað er minst 5 ferðir so kostnaðarmikið at framleiða sjónvarp má sigast at Jógvan Jespersen og landsstýrismaðurin í mentamálum Jógvan á Lakjuni eru teir einastu sum kunnu verða nøgdir við at fáa 16 tímar umframt 8 tímar av tíðindum um vikuna av útvarpstilfarið fyri meira enn 30 milliónir.

Sambært Mikkjal Helmstal framleiðir SVF 448 tímar av sjónvarpstilfarið um árið, býtið er sum omanfyri víst fyri somu pengar (30 mill.) Tað vil siga at ein sjónvarpstími kostar kr. 66.964,30.

Um vit siga at ÚF framleiðir 24 tímar um vikuna í 52 vikur er tað 1248 tímar um árið og við at dividera tað við 30.000,000 (30 mill.) er tímaprísurin kr. 24.038.46. Tað má sigast at verða væl goldið. Tað er ein stór mánaðarløn fyri hvønn effektivan senditíma, skal Jógvan Jespersen brúka sama leist til at framleiða sjónvarp skal hetta tal gangast við í minsta lagið 5, tað vil siga at hvør senditími hjá sjónvarpsdeildini hjá nýggja Kringvarp Føroya - sum eg gitið at tað fer at eita - fer at kosta minst kr.120.192,50. So fyri 30 mill. fáa við 249,6 tímar av sjónvarpstilfarið - (ímóti 448 tímun sum nú er) - um árið, tað er 0.94 tímar um dagin, also minni enn ein tími um dagin og tað er ein minking uppá 200 tímar, ein afturgongd uppá 45 %.

Í Dimmalætting 27. august í ár sigur Uni L. Hansen frá útvarpsstjóranum.

Sitat:
Jógvan Jespersen heldur ikki, at føroyingar gjalda ein høgan prís fyri Útvarpið.

Um tú roknar upp á tað, so gjalda fólk fýra krónur um dagin fyri at fáa føroyskt útvarp allan dagin, og tað er ikki nógv, um tú hugsar um, hvat ein sigarett kostar, sigur Jógvan Jespersen. Um vit ganga út frá, at ein pakki av sigarettum kostar 35 krónur, so kostar ein sigarett 1,75 krónur.

Hvat í verðini fær útvarpsstjóran, at koma við slíkari samanlíkning ???. Tað einasta sum eg kann fáa burtur úr hasum er, at pengarnir fara upp í royk í báðum førum. Sigarettir og útvarp! Ja, skilji tann í skilja kann, eg skilji onki.

Í Føroyum er útvarpsgjaldið	1375 kr.
Í Íslandi	775 kr.
Í Danmark	360 kr.
Í Noreg	0 kr.

Harra Jógvan á Lakjuni landstýrismaður, eg vil staðiliga heita á teg um at koma við einum nýggjum argumentið fyri hví tú heldur at útvarpstjórin, er best egnaður til starvið sum superstjórið tá alt talar fyri tí øvugta, eisini vil eg heita á tykkum løgtingsmenn um at leggja uppskot fyri tingið, at starvið sum stjóri á samanlagda stovninum verður lýst leyst og at hann verður settur við tí treytum sum viðvirka til at ÚF aftur verður óheft av handils og vinnulívinum.

Eg ivist onga løtu í at samanlagdi stovnurin kemur at verða eitt botnleyst hol hjá tí almenna at spíta pengar í, og við tí makt sum stjórin kemur at hava, fer ongin politikari, ella nakar annar at tora at siga honum ímótið. Hann situr á tí mesta av tíðindaflutninginum, á meginpartinum av spølunum, tætt knýttur at handils og vinnulívinum.

Stuðlar kann almenna kringvarpið eisini fáa sær, so í framtíðini kann nógv sigast - ella ikki sigast - um virkir og stovnar sum latað pengar til tað almenna kringvarpið.

Nei, ongin kann tá koma aftur og siga at, pressan er korrupt, tá er ov seint, polittikarar hava sjálvir við lóg skapt karmarnar.



Kelda: Skráin av heimasíðuni hjá Útvarp Føroya frá 27/09-04 til 03/10-04



Kelda: SvF

Hyggja vit eitt sindur aftureftir er næstan hvørja fer SVF hevur víst á pengamangul til eitt hvørt, - serliga minnist eg bandasavnið - so kemur útvarpsstjórin fram í miðlunum og manglar eisini pengar, hann gramdi seg bæði um eitt og annað fyrr í ár um ikki meira pengar fingust til ÚF. Og ímóti allari fornuft fekk hann játtað frá Mentamálaráðnum 100 krónur meira frá hvørjum húski, samstundis sum ÚF hevur 10-15 milliónir á bankabók. Hvussu frekur kann ein almennur leiðari tilláta sær at verða?.

Ferðslutrygd er skert við kr. 90.000,- Musikkskúlin manglar eina hálva millión og ein rúgva av almennum stovnum siga fólki upp vegna sparingar. ÚF er fult í pengum og fær hvørja ferð biði verður um meira.

Hvat siga landsgrannskoðarnir um at játta verður einum almennum stovni pengar sum eigur umleið 30% av umsetninginum á bankabók? Er tá ikki nóg nógv kravt, ella eru tit eisini bangnir fyri at siga tað sum sigast skal? Tað hevði verði gott um tykkara viðmerkingar komu fram.

Hevur tað almenna endiliga brúk fyri at spæla um pengar so eiga tit heldur at seta á stovn eitt alment V4 ella Gekk sum saktans kann sendast í almennu miðlunum, men onnur skulu taka sær av tí, óheft av kringvarpsleiðsluni og tað almenna skal ráða fyri hvar pengarnir skulu játtast, - helst til at bøta um korini hjá teimum veikaru í samfelagnum -, tá hevði tann parturin av ávirkanini á tíðindaflutningin uttanífrá verði komin uppá pláss.

Mítt uppskot er at vit venda aftur til tíðina tá Niels Juel Arge sáli var útvarpsstjórið. Ongar handilslýsingar, júst fyri at ÚF kundi verða so óheft frá handils og vinnulívinum sum ein slíkur stovnur hevur fyri neyðini at verða um álitið á tíðindaflutningin skal verða gott. ÚF hevur gott ráð at verða teir pengarnar fyri uttan, klárar verandi stjóri tað ikki er bert at fáa ein annan sum klárar tað.

So góðu politikarar tit hava átikið tykkum eina ábyrgd sum ongin annar í nýggjari tíð hevur sæð makan til, ansa væl eftir at tit ikki skjóta tykkum sjálvi í beinini, eitt vælskeið er stutt, men vit skulu øll - eisini tit - frameftir liva í einum góðum, demukratiskum landið við so óheftari pressu sum gjørligt, tað hava tit møguleika at viðvirka til nú.

Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

VIÐMERKINGAR

Tað verður ikki alt fleytir, – ið tyril kemur í

Tórbjørn Jacobsen

Útvarpsmanningin hevur aftur sett Fimmaran, leingi saknaðu tjaksendingina, á vetrarskránna. Ein sjálvsøgd public-service uppgáva. Skal fólkaræði hava ein tjans og mennast á bráðpannuni, harið ymiskar og tvørgangandi hugsanir verða bræddar, greinaðar og feldar í ávegis niðurstøður, sum síðani kunna førka fólkið og samfelagið longur fram á leið. Í sama viðfangi krevst sjálvandi, at fjórða statsmaktin fer út á hvørvisteinin og hvessir sær telgimuddarnar, annars skríða durkdrivnu aktørarnir bara sum kimiligir ormar í vátlendinum og meginparturin av lurtarafjøldini er meira massfoss enn hon var frammanundan sendingini.

Mikudagin var aktuelli skattalættin á skránni. Treysti landsstýrismaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum í seks ár, Karsten Hansen, megnaði óvanliga væl at tosa fyri sínum og floksins sjónarmiðum. Ímeðan fólkafloksins formaður in spe, Jørgen Niclasen, fulltikni papageykurin hjá Óla Breckmann, hespaði upp allar borgarligu flosklarnar, sum føroysku sosialdemokratarnir nú eisini eru vorðnir ein avgerðandi partur av. Skattalætti til teirra, ið hava ovmikið frammanundan, gjørdist herskni kosturin hjá Eidesgaard fyri eina løgmanstaburett, sum við hetta lag verður avpolitiserað, skal landsins evsti leiðari ikki vera annað í framtíðini, enn ein boksibóltur úr gummi, ið fer undan, líkamikið hvørjum horni tú spankar hann úr. Alt verður sopið fyri statusið.

Var ov seinur á avtrekkjaranum, slapp tí ikki framat teimum báðum Karsteni og Jørgeni, tí kemur hendan viðmerkingin eitt sindur seinkað á sjóvarfallinum.

Skattalætti er vorðin ein sálarløstur hjá ávísum fólkafloksmonnum. Ein trúðarsøk, sum alt annað má víkja fyri. Tað ber til at gita um, hvørið orsøkin er. Teirra skilmarking av sjálvberandi búskapi er ein fíggjarlóg sum javnvigar. Eftir at ríkisveitingin er burtur med alla. Hetta sigst vera eitt mál, sum teir virka fyri, men so alvegis komplexur, sum flokkurin er, á fullveldiskósini, er tað sjálvandi neyðugt at forkoma hesum argumentinum við eini ríð av áhaldandi skattalættum og harvið minkandi inntøkum í landsins húsarhaldi. Hetta er háborðskostur hjá sambandsmonnum og kanska javnaðarmonnum við, løgið tó, at føroyskir javnaðarmenn skula vera so lítið í slekt við sínar altjóða brøður, at teir nú ætla at fremja í verki heimsins mest ósosiala og ósolidariska lætta í skattinum. Tyrlarnir skúma róman upp í troðini hjá teimum ríku, ímeðan tey, ið formáa sær minni fíggjarliga, framhaldandi skula skorða somu vøddamegina uppundir samfelagsskútuna – undir javnaðarleiðslu.

Skattalættar hava verið partur av fíggjarlógarviðgerðunum øll hesi seinastu árini. Neyðsemjur máttu gerast fyri at politiska samstarvið kundi halda fram. Tó eydnaðist tað altíð Tjóðveldisflokkinum at skipa lættarnar soleiðis, at teir vendu sosialt rætt, at byrðarnar vórðu skeklaðar uppá herðarnar alt eftir sum evnini at bera vóru. Rættast hevði tó verið at kveistrað hetta fólkafloksmantra´ið til viks og skorið djúpari í ríkisveitingina, soleiðis at sjálverandi búskapurin og republikkin vóru tað nærri í dag. Men ideologiska yvirguruin hjá Fólkaflokkinum vildi tað øðrvísi og sambært Jørgeni situr andaligi faðirin nú og skrivar eina heila bók um skatt, sum ivaleyst verður líka so subjektiv og tendensiøs sum alt annað, ið er komið úr hansara hondum. Eitt propagandarit, eitt jarnbrot, í áhaldandi strembanini eftir at forkoma landsins lunnindum. Og harvið øllum tosi og verki um einar sjálvstøðugar Føroyar.

Skattalættar eru alneyðugir, um so er, at initiativríkidømið framhaldandi og áhaldandi skal blomstra, segði Jørgen Niclasen í Fimmaranum. Síðani vassaði hann út í eina samberíng av amerikanska og føroyska samfelagnum. Reagan varð hildin fram sum tað stóra oraklið. Í fyrsta lagið er tað ómøguligt og ósambæriligt at tosa javnbjóðis um tveir so ólíkar búskapir, annar ein sera framkomin ídnaðarbúskapur og hin ein primitivur monobúskapur, ið lagar seg alt eftir hvussu svangir ið gómarnir eru inni á meginlandinum og í aðru syftu var Ronald Reagan, í berum skilaloysi, væl á veg, at flyta amerikanska samfelagið út av búskaparligu tromini, m.a. við sínum vitleysu skattalættum.

Ongin loftaði Jørgeni í hesum óviðkomandi vavstrinum. Ætla amerikumenn at vaksa um ferðina á búskapinum so skrúva teir sjuntin upp á transportbondunum. Hetta gerst ikki í føroysku tilfeingis-vinnuni, sum er vorðin eitt slag av eini fellu í føroyska búskapinum. Evnini, at berja seg uppum hetta loftið, eru ikki komin til sjónar enn. Óvist hví. Men til ber, at gita seg fram til eina niðurstøðu.

Ímeðan skattalættar eru lætnir á hvørjum ári í nógv ár og Fólkaflokkurin hevur umsitið og hevur verið settur til at reka landsins vinnupolitikk, er initiativríkidømið dovnað, almenni parturin av búskapinum vaksin við risafetum og vinnupolitikkurin niðurkókaður til spurningar um pullartar, postkassar, mafiakendar sølur av mjólkarkvotum, skravaðar fóðringar umborð á Smyrli og um innkoyringina til høvuðsstaðin. Detailsvass. Fjølmiðlagreði og evnaloysi. Seminaristiskt bakipulvur fyri fákunnugar atkvøður.

Eftir eina áralanga ríð av skattalættum er føroyski búskapurin nú í stórari afturgongd. Hetta er próvfast. Tí átti fólkafloksins Benjamin ikki at sloppið so snikkaleysur í sínum propagandistisku herðindum í útvarpinum mikudagin. Vónandi fer hann at svara okkum spurninginum hvarið allur virkisandin bleiv av í øllum skattalættameldrinum tey seks árini vit sótu í stjórn saman. Tað stendur greitt fyri øllum, at tað lekur álvarsliga ímillum teori og praksis hjá yvirguruini, sum slaviskt verður endurgivin av formanninum in spe. Her skal sterkur lútur til, skal veruleikin afturvísast. Og tað má eftirhondini vera eitt fólkakrav, at Jørgen ger greiði á, hvussu hetta nú einaferð hongur saman.

Allir flokkar hava sagt seg at virka fyri einum sjálvberandi búskapi. Tað krevur umframt eitt felagstrygdarnet í undirvísing, mentan, heilsu, almannaverki og umsiting eina uppdrift sum røkkur til sjálvfíggingina av føroyska samfelagnum. Soleiðis at eisini vaskikonurnar á Vesturbrúgv kunna avlastast fyri materiella okrið úr Føroyum.

Treytin er eitt greitt mál. Ein greiður vinnupolitikkur. Ein greiður fíggjarpolitikkur. Og stórsti trupulleikin hesi árini er, at vit ongan vinnupolitikk hava havt yvirhøvur. Ímeðan Fólkaflokkurin hevur skeklað gumpin fastan í Vinnumálaráðið, er almenni parturin av eginognini, í føroyskum partafeløgum, vaksin við umleið 20%´um. Og hetta broytist neyvan, nú Kristian Magnussen í tinginum segði okkum, at líkamikið hvussu teir togaðu og toygdu Fólkaflokkin, so fingust teir ikki somikið sum at selja ein almennan lastvogn, – tíansheldur nakað annað.

Og júst har liggur miséran í øllum. Fólkaflokkurin heldur rimmarfast um ein norðurkoreanskan vinnupolitikk og harvið ein ditto búskaparpolitikk, sum líkamikið hvussu víkir og vendir drepur alt initiativ og allar spírar sum standa klárir at spretta úr svørðinum tann dagin tá ið Fólkaflokkurin yvirgevur seg í sínum elskaða domicili úti á Tinganes helluni.

Tann dagin veksur eldur úr eimi og føroyingar kunna aftur ganga frameftir ímóti einum frælsum sjávberandi búskapi og harvið eini sjálvstøðugari tjóð.

Fái meg annars illani at trúgva, at taburettlímið er so seigt, at Javnaðarflokkurin í drúgt tíðarmál ætlar at seyrga sína egnu hugsjón við átøkum, sum eittans ganga yvirstættini og luxusdýrunum í Føroyum til handa. Pípuroykur kann fjala yvir nógva óhumsku, men ikki yvir eina vaksandi sosiala gjógv ímillum tey ríku og tey fátæku í dagsins Føroyum. So frætt av tæri mátti hóast alt verið eftir í føroyskum javnaðarmonnum, at teir ikki lata Óla Breckmann og hansara politiska baby, Jørgen Niclasen, sleipa seg út av hugsjónaðarligu eggini. Kampurin stendur nú ímillum taburettlímið og hugsjónina. Ikki so lítið spennandi at vera eygleiðari í hesum drápuliga bardaga. Vinnur fáfongdin ella ideologiin. Tað spyrst um livst.

Stríput Valflesk

Johan Mortensen
Valevni Tjóðveldisflokksins til Býráði



VAL04

Tað er undirhaldandi at meirilutin í undarfarna Býráði sum nú aftur bjóðar seg fram til val hostar upp við øllum ótrúligum marglætistilboðum um skygni í Býraðnum, frítíðarskúlum, systkinna-avslátturi, fimleiki, ítróttarhallum, ellisheimum, frælsum ítrótti, rennibreytum, vinnulívi og Gud-Í-Himli-Viti-Hvat-Man- Annars-Finnur-Uppá og alt er so gott og promising!

Eg sigi bert : **hví gjørdu Býráðslimir so lítið við hesi mál tá tey høvdu møguleikan og vald til tess?**

Tað er ein fúl undirmeting av veljaranum og ov bíligt og óseriøst aftur at koma við strípputum valfleski, hovski snovski og lyftum um framhaldandi oysli við almennum skattakrónum.

At sita í Býráðnum krevur ábyrgdarkenslu og habilitet. At avgreiða mál Tórshavn at frama, ikki at hava eitt fýra ára alment bein at gnaga og gysser í kassan fyri nevndarfundir og hugnaligar ferðir til vinarbýir og døgurðar og borðfæ og kanningarferðir og skeiðir og hvat man annars kallar allar hesar herligu ágóðarnar sum fylgja við einum sessi í Tórshavnar Býráði, alt goldið av hart plágaða skattagjaldaranum.

Skúlaveruleikin hjá Tjóðveldisflokkinum

Heðin Zachariasen
løgtingsmaður



Framsøgukvinna tjóðveldisfloksins Heidi Petersen skrivar í grein síni at teirra metan er at ein tílíkur miðnámsdepil vil í framtíðini gerast tann platformurin, sum øll tann føroyska miðnámsútbúgvingin kann fara at mennast útfrá.

Her meti eg at Heidi Petersen gevur okkum veruliga svari um hví, fiskuvinnuskúlin í Vestmanna bleiv steðgaður í seinasta valskeiði har tjóðveldisflokkurin umsat skúlamál seinastu seks árini, grundgevingin fyri ikki at keypa tann bygning sum ætlanin var, endaði sum øllum kunnugt við einum argumenti á centrimetrum. Út frá tí sum Heidi Petersen skrivar, hevur ætlanin helst ongantíð verið at bygt fiskuvinnuskúlan í Vestmanna, men heldur at fingið fiskivinnuskúlan í sama depil úti í marknagili. Her kunnu vit í Norðstreymoy bert fegnast um at fólkaflokkurin kom at umsita skúlamál og har við, longu nú hevur sett 5 mió av á komandi fíggjarlóg at byggja fiskuvinnuskúla í Vestmanna.

Til ætlanina í Marknagili kann eg siga, at tað ljóðar skilagott at samlað hesar skúlar saman, men tað er ikki rætt at samlað allar miðnámsútbúgvingar í Tórshavn. Annars er at siga, at vit hava ikki endaliga viðgjørt Skúladepilin í Marknagili